## Lukasz er óførur

Fyrsta umfarið í triði bestu donsku deildini hevur verið um vikuskiftið. Fremad Amager, sum Todi Jónsson og aðrir føroyingar eiga, var á útivølli ímóti grannunum B1908. Fremad Amager vann 2-1 eftir 1-1 í 1. hálvleiki. Næstbesta Brøndby liðið spældi á heimavølli ímóti Holbæk. Brøndby vann 3-0. Við føroyskum eygum var merkisvert, at Lukasz Cielsewicz, sum hevur spælt í VB, skoraði tvey tey fyrstu Brøndby málini – í 28. og í 45. minutti.



## Arvesen vann í Danmark

Norski súkklarin hjá danska súkklufelagnum, Team CSC, vann sunnudagin størstu súkklukappingina í Danmark, Post Danmark Rundt. Tað var eisini stóra danska súkklufelagið, Team CSC, sum setti dagsskránna í kappingini, og største kappingin um fremsta plássið var ímillum Arvesen, Matti Breschel og Nicki Sørensen, sum allir súkkla fyri CSC. Í síðsta gjørdist einkulstarturin leygardagin avgerandi. Her eydnaðist Arvesen at taka leiðsluna frá Breschel, og tá etapan sunnudagin endaði í einum massaspurti, gjørdist Arvesen samlaði vinnarin av kappingini.



*EB/Streymur tryggjaði sær sigurin í síðstu sekundunum av útidystinum ímóti VB/Sumba, tá innskifti Arnbjørn Hansen enn einaferð vísti síni góðu evni framman fyri málinum.*

*Mynd: Sofus Debes Johannsen*

VB/Sumba – EB/Streymur 1-2 (1-0)

# Yvirtíðin avgjørdi alt

**Eftir hálvananan tíma stóð á jøvnum í uppgerðini millum felagsliðini í bestu deildini. Javnleikur kundi hvørgin partur tó brúka til nakað, og í yvirtíðini fekk EB/ Streymur avgerandi málið**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Setningurin hjá VB/Sumba

*VB/Sumba*

*EB/Streymur*

var greiður. Teir skuldu hava stig, helst fleiri, burtur úr sunnudagsins dysti. Eisini hóast mótstøðuliðið æt EB/Streymur. Og felagsliðið úr Suðuroynni hevði eisini fleiri stig í hondini til tað restaðu tíggju minuttir. Tá javnaði Símun Eliasen, og suðuroyingar høvdu bara eitt stig eftir. Men í yvirtíðini mistu teir eisini hetta, tá Arnbjørn Hansen skoraði, og so stóð VB/Sumba eftir við ongum, meðan EB/ Streymur fór við øllum.

Samanumtikið var tað heldur einki galið í, at EB/ Streymur vann dystin. Teir høvdu bóltin mest, flest kjansir og vóru eisini betra liðið, hóast VB/Sumba var á odda meginpartin av dystinum.

### Góða gongdin brotin

Gongdin seinastu dystirnar fyri summarsteðgin hevði verið góð hjá VB/Sumba. Fýra teir síðstu dystirnir høvdu allir givið stig, og av seks teimum seinastu dystunum hevði VB/Sumba bara tapt ein.

Og heimaliðið fekk eisini ein lovandi byrjan í fyrsta dystinum eftir summarsteðgin. Tá stívliga eitt korter var farið, legði Jón Krosslá Poulsen heimaliðið á odda, tá hann skamt uttanfyri brotsteigin setti bóltin hart og flatt í málið dygst við handara stong. Málið gav monnum trúnna upp á, at tað bar til. Eisini hóast teir eftir hetta vórðu pressaðir nakrar metrar aftur á vøllin, og vóru undir støðugum trýsti tað, sum eftir var av dystinum.

### Fýra ferðir í netið

Eftir málið handlaði EB/ Streymur skjótt. Venjarin sendi eitt greitt tekin um, at hetta bar ikki til og skifti hann nýggja miðvallarleikaran Zsolt Szekeres út við Hanus Eliasen. Við hesari útskifting broyttu teir eisini skipanina frá at vera eina 4-5-1 til eina reina 4-4-2 við Sorin Anghel og Karoly Potemkin fremst. Hetta vísti seg at rigga nakað væl betur, og koyrdi spælið hjá EB/Streymi eisini rættiliga væl eftir hetta.

Teir skaptu sær eina rúgvu av kjansum, fleiri hálvar og nógvar heilar, men inn vildi bólturin ikki. Upp um og framvið og so einaferð á tvørtræið. Og tá bólturin so endiliga fór í málið, so vóru tey av røttum kolldømd. Fyrst fekk Ronnie Samuelsen bóltin í netið, og síðani Karoly Potemkin, men báðar ferðir høvdu teir runnið seg í rangstøðu.

### Hepni skuldi til

Tá tað restaðu bara tíggju minuttir var VB/Sumba framvegis á odda. Men trýstið á Vlada Filipovic var øgiligt og hevði málverjin hjá VB/Sumba staðið ein megnar dyst, har hann hevði vart fyri mangari naskari málroynd. Hesa seinastu løtuna stóðu áskoðararnir sum á nálum. Heimaáskoðararnir í vónini um at fáa trý kærkomin stig á kontoina, og teir vitjandi í vónini um at fáa eitt mál og helst tvey.

Tá tað hvørki spurdist nakað burtur úr vandamiklum skotum úti frá ella gjøgnumspældum álopum, var tað ironiskt nokk eitt rættiliga heppið mál, sum setti gongd á hjá EB/Streymi.

Símun Eliasen var komin framvið í álop, og úr vinstru sendi hann nakað sum minti um eitt innlegg innfyri. Bólturin fann tó ongan liðfelaga men fór beina kós í mál, har málverji og verja bara kundu hyggja spyrjandi upp á hvønn annan.

Í yvirtíðini var málið hjá EB/Streymi minni heppið, men meiri gjøgnumspælt. Hans Pauli Samuelsen spældi innskifta Arnbjørn Hansen leysan, og einsamallur við málverjanum sveik hann ikki.

Soleiðis misti VB/Sumba alt, sum missast kundi, seinastu minuttirnar. Fyrst tey trý stigini og síðani tað eina, sum teir høvdu í yvirtíðini. EB/Streymur gjørdi hinvegin tað, sum kravt var av teimum frammanundan, um teir ynsktu at fylgja hinum báðum liðunum frammanan fyri seg.

## Vildu meiri enn vit fingu

Dan Djurhuus, liðformaður hjá VB/Sumba, iðraði seg um mistu stigini eftir dystin. – Hatta var harmiligt. Vit ætlaðu okkum trý ella í minsta lagi eitt stig, men alt glapp okkum av hondum, segði Dan Djurhuus við Útvarpið eftir dystin. Hann viðgekk, at VB/ Sumba kanska ikki spældi so væl, men rósti stríðsandanum og segði, at menninir gjarna vildu meira, enn teir fingu. Somuleiðis helt hann tað vera nøkur keðilig mál, sum EB/Streymur fekk, tí sum hann segði, so kundu teir kanska skora upp á okkurt annað, enn júst hasar kjansirnar. Dan Djurhuus staðfesti tó kortini, at teir framvegis trúgva upp á, at tað fer at lata seg gera hjá teimum í Formuladeildini.

## Framvegis við í toppinum

Arnbjørn Hansen avloysti Karoly Potemkin í seinna hálvleiki og gjørdist eisini matchvinnari, tá hann í yvirtíðini tryggjaði EB/Streymi sigursmálið. – Hatta vóru nøkur týdningarmikil stig, vit fingu í dag, tí annars vóru vit næstan avskrivaðir, segði Arnbjørn í viðmerking við Útvarpið eftir dystin. Spurdur um teir trúðu upp á tað alla tíðina, svaraði Arnbjørn, at um ynskið er at liggja í fremstu røð, so er neyðugt at kempa allar 90 minuttirnar umframt tað eyka, sum dómarin leggur aftur. – Men vit eru so framvegis við enn í oddinum, staðfesti ungi kollfirðingurin.

**-rólant**